

*Símun og Johanna saman við børnunum um 1920.* ***Aftast frá vinstru:*** *Jenny, Esbern, Jógvan og Emma.* ***Fremst:*** *Símun, Ebbadina, Jóhanna og Malla*

Símun gavst tó ikki. Einaferð miðskeiðis í 30-unum skipaði hann fyri almennum fundi. Kommunustýrið og løgtingsverkfrøðingurin vóru eisini á fundinum. Símun mælti til at byrja eina komandi havnarbygging soleiðis, at ein verjugarður varð gjørdur móti høgættini nakað norðanfyri Høgaból. Atløgubryggjur kundu so vera bygdar fram við tí stóra og slætta lendinum. Men hetta varð avvíst av teimum, sum tá ráddu fyri borgum í kommununi.

Símun skipaði eisini fyri, at adressur vóru bornar út í húsini at fáa fólk at skriva undir einum kravi um at fáa eina havnarætlan gjørda fyri Saltangará.

Hóast sóknarstýrið var ímóti, so høvdu landsmyndugleikarnir áhuga fyri hesum, og fyri kríggið samtyktu bæði landsnevnd og løgting eina havnarætlan fyri Saltangará. Løgtingið samtykti eisini at lata 75% av kostnaðinum í stuðul til byggingina, men treytin var, at kommunustýrið tók undir við hesum, og at arbeiðið skuldi vera byrjað innan árslok 1943.

Fyri at skunda undir málinum varð aftur skipað fyri eini nýggjari adressu. Seinast í 1943 varð loksins farið í holt við at byggja havn í Saltangará. Men verjugarðurin, sum løgtingsverkfrøðingurin mælti til at gera norðan fyri Høgaból, varð gjørdur einar 300 metrar sunnanfyri.

Úrslitið av hesum trongskygni var, at har kom ein havnahylur, har bert smábátar kundu liggja. Har var ikki pláss fyri meira enn tí eina virkinum. Nógva bakbrotið, sum kom frá verjugarðinum, gjørdi, at ikki bar til at liggja við brúnna á Høgabóli, tá illveður var høgt. Soleiðis gjørdist virkið á Høgabólið verri fyri enn frammanundan, eftir at havnin var komin.

Hetta var mitt undir krígnum, so tað var ringt at fáa tilfar. Fyri at fáa byrjað, breyt Símun gólvið upp í Ovarahúsi, sum hann lat sóknarstýrinum at smíða formar burtur úr. Tískil var fyrsta almenna havnabyggingin á landsynningsarmi á Skálafjørðinum gjørd við formum hjá Símuni, hóast hon ikki varð sett har Símun helt, hon átti at standa, og hóast hann eisini dugdi at síggja, at hesin fyrsti parturin av havnabyggingini kom at vera hansara virki meira til ógagns enn gagns!

## Siglingin undir krígnum

Tá ið kríggið kom, fóru øll tey trý skipini á Høgabóli at sigla við ísfiski til Bretlands. Tey sigldu bæði vetur og summar. Í 1941 fóru Lizzie og Galathea á land Úti á Skerum í eini ræðuligari ódn, sum var hendan veturin. William Martin, sum reiðarafelagið á Høgabóli reiddi út í mong ár, fór á land úti á Rókini og sakk. Galathea, ið fekk største skaðan var til umvælingar í næstan eitt ár. Øll stýriborðssíðan var brotin. Tryggingin gav hana upp sum vrak.

Men av tí, at ov fá skip vóru, lat Símun hana gera aftur á Tórshavnar Skipasmiðju. Tá ið hon var umvæld og skuldi verða flotað, vildi so illa til, at vognurin, sum hon stóð á, brotnaði, og hon datt niður á bakborðssíðu. Hon brotnaði so illa, at eisini henda síðan mátti verða endurnýggjað øll sum hon var.

Skipini á Høgabóli gjørdu 55 túrar til Bretlands í alt undir krígnum. Tey seldu fyri 140.709 pund til samans. Tað vóru 3,1 milliónur tá. Í nútíðar krónum ein risaupphædd.

## Sorgarleikurin við Verdandi

Tá ið kríggið leið at enda, fóru føroyingarnir sjálvir at fiska við sluppunum, og tað var eisini gjørt við skipunum á Høgabóli. Hetta gjørdi eisini, at manningin gjørdist størri. Við Verdandi vóru 13 mans, meðan manningin var sjey, tá ið fiskur varð keyptur.

Í oktober 1944 lógu nógv føroysk skip inni á Siglufjørðinum og krokaðu, tí veðrið var so ringt.

Galathea og Verdandi, sum báðar vóru farnar at royna við línu, lógu eisini inni. Túrurin hjá Galatheu var um at vera av. Men Verdandi var júst byrjað túr, og hon hevði bert havt einar tvær ella tríggjar setur. Av tí, at illveðrið vardi so leingi, og fiskurin var farin at eldast, varð gjørt av, at fiskurin umborð á Verdandi skuldi verða skipaður umborð á Galatheu, sum so skuldi fara til Bretlands við honum. Verdandi skuldi so fara til Akranes, norðanfyri Reykjavík, at keypa fisk uppí lastina.

So ein seinnapart var ein skái. Galathea slapp út og kom til Bretlands í øllum góðum. Dagin eftir var veðrið batnað nakað, men illveður var enn. Tá fór Verdandi av Siglufirði, men hon kom ongantíð vegin fram. Fimtan menn fórust, tveir av teimum vóru ferðamenn.

## Var á møti saman við mannningi

Tórhallur Andreassen av Oyrabakka var staddur á Siglufirði tá. Hann mundi vera millum teir seinastu, sum hitti manningina.

Hann hevur greitt soleiðis frá í Miðvikuni: "Eg hevði verið á møti kvøldið fyri, sum teir á Verdandi fóru av Siglufjørðinum. Teir sum høvdu møtið vóru Óli, skiparin á Verdandi og Tummas farbróður, sum arbeiddi á bedingini í býnum. Tað var hildið í einum lítlum sali á Siglufjørðinum. Øll manningin á Verdandi var har. Tað vóru eisini fleiri teirra sum vitnaðu.

Tað vóru ongar rutur til Føroya tá. Tí vóru eisini tveir ferðamenn umborð, sum høvdu biðið um at sleppa heima við.

Eg plagdi ofta at vera umborð hjá teimum. Nú fáa teir møguleika at fara á Akranes at fáa fisk.



*Símun á eldri árum*

Har kundu teir fáa 40 tons. Tað er langt av Siglufjørðin á Akranes og farast skuldi vestureftir tvørtur við Vestfjarðirnar, sum er tiltikið pláss fyri veður. Eg fylgdi teimum út á oljukajuna, tá ið teir fóru avstað. Teir fóru so, og barometrið var í botni. Kl. 10 um kvøldið brendi hann á við kavaroki. Tað vardi átta samfullar dagar. Einki hoyrdist aftur frá Verdandi. Teir vóru 15 mans við. Tað var grúiligt. Óli í Búrstovu var hiðani (av Oyrabakka.) Tað sama vóru Petur og Olaf. Eg kendi teir flestu av monnunum.

Agenturin í Akranesi visti, at teir vóru á veg. Tá ið skipið ikki kom fram tann dagin, teir væntaðu tað, og tað heldur ikki fræ ttist frá teimum teir fylgjandi dagarnar, gjørdist órógvin størri



*Jóhanna á 95 ára degnum*